








# Renault nýggjheit: Renault Grand Scénic til 7 persónar

**Renault Scénic II, sum fyri stuttum kom út við heilt nýggjum modelli, er nú eisini komin út í eini longri útgávu, Grand Scénic, við 7 sitiplássum.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Renault Grand Scénic er ein stórur og rúmligur 7-persóna mini-MPV, sum er 23 cm longri við 5 cm longri aksilfrástøðu enn Scénic II.





*Renault Grand Scénic er ein sjey persóna mini-MPV, sum er 23 cm longri enn Scénic II*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Talan er um ein innbjóðandi, væl útgjørdan og vælkoyrandi bil við nógvum hillum og smáum rúmum til at leggja lutir frá sær á.

Við øllum 7 setrunum uppi er viðførisrúmið 200 litrar og við baksetrunum niðri verður tað heilar 1920 litrar.

Trygdin í Grand Scénic er heilt í topp við nógvum innbygdum trygdarskipanum, sum arbeiða væl saman, soleiðis at persónarnir í kabinuni altíð eru væl vardir.

**Frá VR Bilum við Hoyvíksvegin verður sagt, at Volvo V50 og Renault Grand Scénic koma í juni**

# Volvo nýggjheit: Stationvognurin Volvo V50

**Volvo eru komnir á marknaðin við nýggja stationvogninum V50, sum verður gjørdur á bilverksmiðjuni hjá Volvo Cars í Gent í Belgia. Bilurin hevur hópin av innbygdum trygdarskipanum**

BILAR
*Magnus gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Stationcar útgávan av Volvo S40 eitur nú V50, ein bilur har nógv er gjørt burtur úr trygdini og designinum.

Filosofiin hjá Volvo er, at komforturin vera á sama støði sum á teimum størru Volvo, og málsetningurin er sum altíð, at S50 skal verða tann tryggasti í sínum klassa og líka tryggur sum allir aðrir Volvo. Sum vanligt hjá Volvo eru setrini í heimsklassa.

Bilurin hevur nógvar innbygdar aktivar og passivar trygdarskipanir.

V50 hevur elektrohydrauliska servostýring og saman við framkomna undirvogninum við t.d. multilink upphangum aftan, gevur hetta bilinum sera góðar koyrieginleikar .



*Nýggi stationvognurin Volvo V50 er gjørdur á bilverksmiðjuni hjá Volvo Car í Gent í Belgia*
*Mynd Álvur Haraldsen*

